Wenzel Petersen og Vilhelm Nielsen:

# Framskygdir undangongumenn

**Wenzel Petersen stovnaði fyritøkuna, har hann saman við Vilhelm Nielsen seldi fyrsta bilin í Føroyum. Hann var ein íðin og framskygdur maður. Hann var m.a. við til at stovna Havnar Handverksmeistarafelag og var býráðslimur í mong ár**

*Magnus Gunnarsson*





*Wenzel Petersen og Vilhelm Nielsen, tveir undangongumenn í føroysku bilavinnugreinini. Teir báðir vóru svágrar, og seldu teir fyrsta bilin, ið innfluttur varð til Føroya, ein Ford T lastvogn í 1922. Seinni fingu teir sær hvør sína fyritøku, tí teir umboðaðu bilmerki, ið kappaðust, Ford og Chevroelt (GM)*

Wenzel Petersen varð føddur tann 2. november 1887 í Tróndargøtu í Havn, sonur Petur Petersen úr Saltnesi. Familjan flutti til Havnar, stutt áðrenn Wenzel varð føddur. Pápin var bróður Fríðrik Petersen próst. Liðugur við skúlan fór Wenzel í smiðjulæru. Sum útlærdur smiður fór hann 18 ára gamal til Keypmannahavnar, har hann starvaðist í Titan maskinverksmiðjuni, samstundis sum hann fekk sær útbúgving sum elektrikari. Hann búði í Danmark eini 10 ár og giftist við Sofiu, dóttir Óla Svenn Svendsen úr Havn.

### Wenzel og Vilhelm møtast

Wenzel fór í 1916 at sigla sum elektrikari í eitt ár við ØK skipinum "Falstria". Har kom hann at sigla saman við einum dana, Vilhelm Nielsen, sum seinni giftist við Sigrid, systir konu hansara. Wenzel stovnar í 1917 ein maskinhandil í Havn, sum m.a. fekst við at installerað DAN-gløðihøvdmotorar í fiskiskip og bátar.

Í 1919 keypur hann Quillingsgarð í Havn, saman við eigaranum av Sápuhúsinum. Quillingsgarður var tá ein stórur bygningur, og smiðjan fekk innivist í fjósinum, ið hoyrdi til ognirnar. Ein maskinverkstaður var innrættaður, har sum Breidal fotografur áður hevði havt atelier. Wenzel og konan høvdu leiga eini hús í Konradsbrekku, men nú fluttu tey inn í Quillingsgarð at búgva.

### Fyrsti bilurin kemur til landið

Samstarvið millum svágrarnar Wenzel Petersen og Vilhelm Nielsen byrjar í 1920 og vardi í eini 7 ár. Í hesum tíðarskeiði eydnaðist teimum at skapa søgu her á landi, við tað at teir í 1922 skipaðu fyri at fyrsti bilurin kom til Føroya, tann 6.maj. Tað var ein 1-tons Ford TT lastbilur sum Júst Sivertsen og Johannes Olsen keyptu.

Teir seldu Ford bilarnar at byrja við, og seinni fingu teir eisini umboð fyri General Motors, har ímillum aðrar Chevrolet bilarnir høvdu teirra áhuga. Ford kundi ikki góðtaka, at teir seldu hesi bilsløgini saman. Hetta førdi við sær, at teir samdust um at Vilhelm Nielsen fekk General Motors umboðið. Síðst í 20-árunum flutti Vilhelm út í smiðjuna hjá Sigmund Arge, úti í Grind, yvirav smiðjuni í Lítluvík. Hann var har til nýggi bygningurin í Jónas Broncksgøtu var liðugur í 1935.

### Bretar løgdu hald á Quillingsgarð

Tá bretar komu til Føroyar í 1940, løgdu teir hald á Quillingsgarð, og Wenzel flutti við familjuni út í Havnardal at búgva. Tá kríggið var av, byrjaði sonur Wenzel, Jóhannes Svend, verkfrøðingur, saman við Hjalgrími Hentze at umboða Alpha Diesel motorar. Fyrstu tíðina hildu teir til í einum pakkhúsið, men virksemi vaks, og teir máttu finna onnur hølir. Teir fluttu í eini hús úti í Bakka við maskinverkstaðnum og Alpha Diesel umboðnum. Í 1952 keypir Wenzel Petersen bygningin úti í Bakka, og í 1957 flytur bilasølan og bilverkstaðurin úr Quillingsgarði og inn har. Um hesa tíðina arbeiddu um 40 fólk í fyritøkuni.

Wenzel Petersen var ein íðin og framskygdur maður. Hann var býráðslimur í nøgv ár bæði áðrenn og eftir kríggið. Hann var í teknisku nevnd og havnarnevndini og í nevndini í Havnar Handverksmeistarafelag.

Wenzel Petersen andaðist 21. oktober í 1954, 67 ára gamal.

### Fyritøkan flytur niðan á Oyggjarvegin

Alt virksemi var samlað úti í Bakka til 1970, tá bilasølan og bilverkstaðurin flyta í nýggjan bygning við Oyggjarvegin. 20 ár seinni, í 1990, flytur mekaniski verkstaðurin eisini í nýggjan bygning við Oyggjarvegin á sama øki sum bilasølan, har sum Maskinmeistaraskúlin er í dag. Húsini úti í Bakka keypti kommunan í 1986.

Fyritøkan kláraði seg ígjøgnum góðar og ringar tíðir, sølan av bilum gekk væl og okkurt árið í áttatiárunum vóru seldir yvir 400 bilar, og eini 70 fólk vóru í arbeiði. Fyritøkan var býtt upp í 5 deildir, bilasølu, maskinverkstað, skipsútgerð, ídnaðarútgerð og gass-sølu umframt eina deild í Vági. Men búskaparkreppan fyrst í nýtiárunum hevði eina so ógvusliga afturgongd við sær, at meginparturin av fyritøkuni P/F Wenzel Petersen konsernini hóraði ikki undan, og alt virksemi í báðum bygningunum helt uppat. Bert gass-sølan slapp undan at steðga upp.

### P/F Wenzel

Tað var tó skjótt at fyrrverandi starvsfólkini byrjaðu av nýggjum, og nøkur byrjaðu fyri seg sjálvan. Abbasynir hjá Wenzel Petersen stovnaðu fyritøkuna P/F Wenzel, og hildu áfram við Ford umboðnum við Óla-Svenn Nolsøe sum stjóra. Bilasølan og bilverkstaðurin eru úti í Akranesgøtu, og plátuverkstaðurin er við Marknagilsvegin. Starvsfólkið hevur støðast væl í fyritøkuni, eitt nú Hans Mortensen sum byrjaði hjá Wenzel Petersen 1.juni 1955, og er í fyritøkuni enn.



*Ford Fairlane hjá Petur Jacobsen. Bilurin var upprunaliga gulur. Seinni bleiv hann lakkeraður svartur og fekk nógvar eyka pyntilistar. Av sonnum ein flottur bilur, ið ikki smæðist burtur við síðuna av kongaskipinum Dannabrog*



# Ford Motor Company hundrað ár

**16. juni í ár eru liðin 100 ár síðan Ford Motor Company varð stovnað. Í ár eru eisini liðin 140 ár síðan stovnarin av fyritøkuni, Henry Ford, varð føddur, og 90 ár síðan hann, sum tann fyrsti í heiminum, byrjaði at framleiða bilar á samlibandi**

*Magnus Gunnarsson*



*Henry Ford og konan, Clara, í einum av fyrstu bilunum hjá honum*

Henry F. Ford varð føddur í 1863. Hann var bóndasonur, men hugur hansara stóð meira til mekanik enn til jarðarbrúk. Tá tey motordrivnu akførini komu fram, fekk Henry Ford beinanvegin stóran áhuga fyri teimum, og longu í 1888 gjørdi hann royndir við bensinmotorum á sínum egna lítla verkstaði. Í 1896 gjørdi hann sína fyrstu roynd at gera ein bil við súkkluhjólum og 2 cyl. motori.

Ford Motor Company var stovnað 16. juni 1903. Fyrstu bilarnir vóru Ford A, síðan kom Ford B. Ársframleiðslan í 1906 var næstan 9000 bilar. Henry Ford og hansara fólk gjørdu í 1907, klárt til Ford T, sum skuldi verða ein "bilur til fólkið" og seljast um allan heimin. Neyðugt varð tí at bilurin skuldi verða slitsterkur, einfalt bygdur og lættur at viðlíkahalda. Framleiðslan byrjaði í desember 1908. Tað sum gjørdi Ford T so kendan, var at bilurin var framleiddur so leingi og í so stórum nøgdum. Íalt vórðu framleiddir yvir 15 milliónir bilar fram til 1927. Frá 1913 varð framleiðslan av Ford T flutt yvir á samliband. Hetta hevði við sær at arbeiði gekk so skjótt at bilarnir kundu seljast til sera kappingarførar prísir. Handan hav komu bilverksmiðjur í einum landi fyri og øðrum eftir. Tann fyrsta kom í Manchester í 1911. Eisini í Danmark komu verksmiðjur sum settu Ford bilar saman í 1919.

Í 1944, tann 23 januar, tekur Henry Ford ll, sonur Edsel, abbasonur Henry Ford, við sum leiðari í Ford Motor Company. Henry Ford doyr tann 1.apríl 1947, 83 ára gamal. Ein sermerktur persónur, ið læt eina risastóra fyritøku eftir seg, og fekk av álvara gongd á bilaframleiðsluna í Amerika og restini av heiminum. Ein triðing av inntøku síni gav hann til vælgerandi endamál. Ford hevur ment seg til eina alheims fyritøku. Amerikanska høvuðssæti er í Dearborn við Detroit. Fyritøkan er privat, og ovasta leiðslan hevur alla tíðina verið í Ford familjuni.

# Goodyear Classic í Føroyum komandi ár

**Eftir at árliga danska Goodyear Classic koyringin bleiv avlýst í fjør, er ein sera áhugaverdur fyrispurningur komin til Føroya Ellisakfør frá Goodyear Danmark A/S um at hava koyringina, Goodyear Classic Atlantic, í Føroyum í 2004.**



*Goodyear sølustjórin vitjar í felagshølunum og greiðir m.a. frá um Goodyear Classic koyringina.*

Í juli 2002 vóru Goodyear sølustjórarnir Kenneth Saust og Flemming Christensen á vitjan hjá Super Dekk í Havn. Báðir eiga teir ellisakfør sjálvir og hava stóran áhuga í gomlum bilum. Teir vitjaðu í felagshølunum hjá Føroya Ellisakførum eitt mánakvøld og greiddu m.a. frá árligu Goodyear Classic koyringini. Teir bjóðaðu føroyingum at luttaka við við egnum ellisakførum í hesi koyring. Tað serliga við koyringini sum skuldi verða í fjør, var, at hetta var tíggjunda ferðin hjá Goodyear Classic tiltakinum. Men orsakað av at eitt annað stórt tiltak innan danskan motorsport var hetta sama vikuskiftið í Keypmannahavn, bleiv Goodyear Classic 2002 avlýst.

Nú hevur Føroya Ellisakfør fingið ein sera áhugaverdan fyrispurning frá Goodyear Danmark A/S, har sølustjórin Kenneth Saust, hevur fingið tað hugskot at hava hesa koyring í Føroyum á sumri í 2004. Hann hugsar sær at umleið 20 ellisakfør koma úr Danmark og nakað tað sama av føroyskum ellisakførum vera við í Goodyear Classic Atlantic Special 2004, sum hann nevnir hesa koyring. Eftir ætlan skal koyringin leggjast til rættis saman við Føroya Ellisakførum og Super Dekk.

Hetta er ein spennandi avbjóðing hjá felagnum. Eitt stórt tiltak sum hetta tekur tíð at fyrireika. Felagið má taka upp samráðingar við løgregluna, fyri at vita um teir vilja geva loyvi til at eitt slíkt tiltak verður hildið í Føroyum.

m.g.